## Ísland lán frá ES

Evropasamveldið hevur samtykt at læna Íslandi 300 milliónir, sum íslendingar skulu rinda aftur við fýra prosentum í rentu. Sambært Viðskiftablaðnum skal stjórnin brúka pengarnar til at tálma avleiðingunum av kreppuni, sum landið er í. Blaðið sigur frá sínum keldum, at tað var neyvan av tilvild, at tilsøgnin frá ES kom júst nú, men at tað uttan iva hevur samband við samtyktina hjá ES-nevndini fyrradagin mæla samveldinum til at samráðast við Ísland um limaskap. Lánið, sum Ísland ú fær, er av sama slagi sum lán, ið ES fyrr hevur latið eitt nú Balkanlondunum.



## Verri at fáa Panodil

Teir politisku myndugleikarnir í Danmark hava ikki nóg gott tamarhald á, hvussu ungfólk brúka pínulinnandi heilivág so sum Panodil-tablettir, og tí ætlar stjórnin at gera nakað við trupulleikan. Hagtølini hjá heilsustýrinum vísa, at ongantíð fyrr hava so nógv ungfólk roynt at taka lívið av sær við pínulinnandi heilivági sum í fjør. Ætlanin hjá stjórnini er, at fólk skulu hava fylt 18 ár, áðrenn tey kunnu fáa pínulinnandi tablettir. Talsfólk hjá summum flokkum halda, at fólk skulu hava ávísing frá lækna fyri at kunna keypa slíkar tablettir, og at í mesta lagi 100 tablettir skulu vera í hvørjum pakka.

# Posthúsini fækka

**Á nýggjárinum hevur Posta møguleikan at niðurleggja fleiri postavgreiðslur, soleiðis at posthúsini fara úr 21 niður í sjey. Nakrar avgreiðslur steingja heilt vist tá, men tað er framvegis ivasamt, hvussu nógvar lata aftur, sigur Sofus Clementsen, stjóri í Posta**

POSTA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




*Posta hevur gjørt fleiri automatiseringar, sum hava havt við sær, at fólk sjáldan hava ørindi á posthúsinum*

Fleiri av teimum 20 starvsfólkunum, sum Posta hósdagin segi úr starvi, fingu ikki tann hvøkkin av uppsagnunum. Nøgdin av posti minkar støðugt, og fleiri uppgávur, sum fólk áður røktu, taka tólini sær av nú.

Tá ið postverkið varð lagt yvir í alment partafelag, varð postverkið bundið við lógini at hava so og so nógv posthús. Í dag eru posthúsini 21 í tali.

Men bindingin av so nógvum posthúsunum gongur bara til 31. desember í ár. Tá kann Posta steingja fleiri postavgreiðslur, so bara sjey posthús verða eftir.

- Men so nógv posthús lata ikki aftur í senn. Vit fara ikki at gera nakra kollvelting, sigur Sofus Clementsen, stjóri í Posta.

Hann sigur, at ymist má gerast, tí tað ber ikki til, at útreiðslurnar eru so nógv størri enn inntøkurnar. Posta Heima, Posta Her, útbering til vinnu í arbeiðstíðini og útbering til privatfólk um kvøldið eru tiltøk, sum Sofus Clementsen heldur eru at veita betri tænastu. Sumt av hesum hevur ymiskar barnasjúkur, men tær lekjast við tíðini.

Nøgdirnar av posti minka alsamt, og tær fara óivað at minka meira enn, sigur Sofus Clementsen, sum ikki vísir aftur, at neyðugt verður at gera aðrar umleggingar ella sparingar.

- Tað loysir seg ikki at vera ov bjartskygd viðvíkjandi nøgdini av posti í framtíðini. Vit mugu laga okkum eftir viðurskiftunum sigur hann.

### Fíggjarkreppan rakt Posta

Sofus Clementsen ivast ikki í, at fíggjarkreppan hevur gjørt sítt til, at færri brøv verða send nú. Fyri at spara brúka fyritøkur heldur elektroniskar miðlar enn at senda brøv við posti.

Pakkaflutningurin í, til og úr Føroyum er væl minni enn í grannalondunum. Sofus Clementsen gevur tollingini ein part av skyldini. Fólk tíma ikki at senda pakkar við tí forðingini, heldur hann.

Broytingartilgongdin er ikki nakað eindømi innan post- og flutningsvirksemi. Í øllum londum, vit vanliga samanbera okkum við, eru post- og flutningsfeløg farin undir og eru væl ávegis í hesi tilgongd.

### Tíðin farin frá posthúsum

Sofus Clementsen heldur tað vera sjálvsagt, at nøkur posthús lata aftur á nýggjárinum. Nøkur av smáu posthúsunum hava bara opið ein ella tveir tímar mitt um dagin, og eingin fer á posthúsið tá.

- Tað er eingin meining í at hava tey posthúsini opin longur, sigur stjórin.

Heldur enn at hava posthús, heldur hann tænastuna við at koyra allan postin út vera nógv betri. Pakkarnir eru so fáir kortini.

Uppsagnirnar hósdagin raktu breitt í Suðuroynni, miðstaðarøkinum, í Norðoyggjum og í Eysturoynni.

- Vit fara sum nevnt ikki at gera nakra kollvelting, men tað verða alla tíðina gjørdar broytingar, og vit eru ikki komin á mál enn, sigur Sofus Clementsen, sum við vissu kann siga, at fleiri starvsfólk verða ikki søgd úr starvi í Posta í ár.

# Mattænastan fer á kommunalar hendur

**Stuðulin, sum Nærverkið letur til mattænastuna, kommunur veita penisionistum, er so nógv minkaður, at kommunurnar nú mugu rinda væl størri part**

ELDRATÆNASTA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Kommunur kunnu á hvørjum ári søkja Nærverkið um stuðul til tænastuna við at koyra mat út til pensjonistar. Men nú er samlaða játtin minkað so nógv, at kommunurnar mugu gjalda bróðurpartin av tí, sum tænastan kostar.

Samlaða játtanin var 2,8 milliónir krónur, men søkt varð um samanlagt 5,2 milliónir krónur.

Hetta merkir eingin kommuna hevur fingið so nógv, sum søkt varð um.

Nes kommuna kann takast sum dømi.

Hendan kommunan søkti um 279.000 krónur, men fekk bara 77.000 krónur.

- Kommunan verður noydd til at gjalda tað, sum restar í, tí tænastan má ikki detta niðurfyri, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri í Nest kommunu.

Tænastan er at koyra døgurðar út til pensjonistar, og fyri tað mesta letur skipanin um 20 døgurðar út av húsinum um dagin.

Døgurðarnir verða gjørdir í sambýlinum, har kommunan hevur sett fólk at arbeiða í nakrar tímar um dagin.

Døgurðin til pensjonistar í Nes kommunu kostar 35 krónur.

*Fleiri kommunur hava skipanir við at koyra døgurðar út til pensjonistar. Nú stuðulin til hesar skipanir er minkaður, noyðast kommunurnar at bera størsta partin av kostnaðinum*

